UTTAN ÚR HEIMI

## Arnold missir undirtøku

Guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, er ikki so væl umtóktur longur.

Sambært einari nýggjari kanning halda 37 prosent av veljarunum í Kalifornia, at guvernørurin roynist væl. Tað er kanska ikki so galið samanborið við undirtøkuna hjá mongum øðrum leiðarum, men trupulleikin er, at umdømið hansara er nógv versnað í seinastuni. Í einari tilsvarandi kanning fyri bara fýra mánaðum síðani søgdu heili 55 prosent, at tey vóru nøgd við guvernørin og tað, sum hann fekk av skafti.

Hetta hevur fingið Schwarzenegger at seta fleiri átøk í verk, sum skulu royna at bøta um umdømi hansara, men higartil hava átøkini ikki givið nakað úrslit, skrivar AP úr Sacramento.

## Bilførarar sovna

Tað er ikki nakað ókent fyribrigdi, at fólk kunnu sovna, meðan tey koyra bil, og í Noregi vísa kanningar, at hvønn dag sovna umleið 500 bilførarar, meðan teir sita við róðrið.

Norsku ferðslumyndugleikarnir siga, at í meðal doyr eitt fólk í ferðsluni um vikuna, tí at ein bilførari sovnar, meðan hann situr við róðrið, og á hvørjum ári fáa umleið 400 fólk skaða av óhappum, ið standast av svøvni. Ferðslumyndugleikarnir hava tosað við 15.000 bilførarar, og kanningin vísir, at tey flestu sovna, tá tey koyra á einum breiðum og beinum vegateini.

Í gjár fóru ferðslumyndugleikarnir undir eitt átak ímóti slíkum óhappum og vanlukkum, tí myndugleikarnir ásanna, at vandin er serliga stórur í teirri nógvu ferðsluni um summarið. Tí er ætlanin at fá bilførararnar at steðga á og at fáa sær ein lítlan lúr, kenna teir seg troyttar. Myndugleikarnir siga, at hjá teimum flestu kunnu 15 minuttir vera nóg mikið til at bjarga mannalívum.

## Skilagóðar leyvur

Fyrr í hesum mánaðinum bleiv ein tólv ára gomul genta rænd og burturflutt har suðuri í Etiopia. Fýra menn fóru avstað við gentuni, tí hon skuldi giftast burtur.

Gentan vildi ikki fara við monnunum, og í tríggjar dagar bukaðu teir hana fyri at fáa hana at akta. Men tann triðja dagin komu tríggjar leyvur gentuni til hjálpar. Tær róku teir fýra menninar burtur og stóðu uppi yvir gentuni, til løgreglan kom og bjargaði gentuni, skrivar AP.

Stuart Williams, sum stendur á odda fyri einari villdjóraverkætlan í Etiopia, sigur við AP, at tað var helst gráturin hjá gentuni, sum fekk leyvurnar at hjálpa henni. Hann ivast ikki í, at hevði gentan ikki grátið, høvdu leyvurnar gjørt av við hana.

Løgreglumaðurin Wondimu Wedajo, sum kom fram á gentuna, sigur, at tað hendir javnan, at ungar gentur verða rændar í sambandi við giftarmál. Hetta er serliga galdandi á bygd, og hann heldur, at umleið 70 prosent av brúðrunum har eru gentur, sum eru burturfluttar.

## Ikki pláss fyri fornlutum

Svensku myndugleikarnir hava boðið sær til at lata Noreg fáa umleið 2.500 fornlutir, sum upprunaliga stava úr Noregi, men norðmenn siga seg ikki hava pláss fyri teimum, skrivar Aftenposten.

Tá norðmenn herfyri hátíðarhildu, at 100 ár vóru liðin, síðani teir fóru burtur úr ríkiseindini við svíar, handaði Carl Gustaf kongur Hákuni krúnprinsi ein virðismiklan lut frá víkingatíðini. Men hesin luturin var bara ein av mongum, sum sviar eru sinnaðir at lata norðmonnum aftur, og tí umhugsa norðmenn nú at byggja eitt nýtt fornminnissavn. Ætlandi verður tað einar 5.000 fermetrar stórt, og nógv bendir á, at tað verður bygt í Bygdøy.

Nógvir norðmenn halda tað vera pínligt, at landið ikki kann hýsa sínum egnu fornlutum, og Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharri, hevur eisini sagt, at stjórnin ætlar at finna eina loysn.



*Seinastu 15 árini eru nógv landminuøki kring heimin ruddað. Her er jordanski herurin í ferð við at rudda eit øki nærhendis Jordan-ánni.*

*Mynd: Reuters*

# Stríðið ímóti landminum hevur givið úrslit

**144 lond hava staðfest forboðið ímóti at brúka landminur, og handilin við landminum er næstan steðgaður.**

LANDMINUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyri 15 árum síðani tóku nøkur fólk seg saman fyri at fáa altjóða samfelagið at banna londum at brúka landminur sum vápn. Arbeiðið hevur givið úrslit, tí nú hava 152 lond skrivað undir forboðið, og 144 teirra hava eisini staðfest tað. Samstundis vísa hagtøl, at handilin við landminum er at kalla steðgaður.

Kortini eru tað lond, sum framvegis brúka landminur. Russiski herurin brúkar tær í Kekenia, og í Burma brúkar herurin tær ímóti uppreistrarmonnum.

Avtalan um forboð ímóti landminum varð undirskrivað í kanadiska býnum Ottawa í 1997, og takkað verði eftirliti hjá virknum felagsskapum hava londini hildið forboðið, sigur Jody Williams, sum var ímillum stigtakararnar fyri 15 árum síðani. Sjálv fekk hon Nobel-friðarheiðurslønina í 1997 fyri sín lut í arbeiðinum ímóti landminum.

### Eisini annað

At átakið ímóti landminum hevur eydnast so væl hevur fingið onnur at taka stig til at banna øðrum vápnasløgum. Eitt nú er felagsskapurin IANSA stovnaður við tí endamáli at fáa londini at banna fólki at hava hondvápn. Jody Williams vísir á, at hondvápn krevja fleiri mannalív í dag enn tey kríggj, sum støðugt eru kring heimin. Hon ásannar tó, at tað verður rupult at fáa undirtøku fyri átakinum.

-Hendan avbjóðingin er nógv størri enn tann ímóti landminum. Tað kemst fyrst og fremst av, at nógvir pengar eru uppií, tá vit tosa um hondvápn, sigur Jody Williams við Dagsavisen.

### Fleiri lond eftir

Sjálvt um átakið ímóti landminunum hevur eydnast betur, enn nakar hevði væntað, eru tað framvegis týðandi lond, sum ikki hava skrivað undir forboðið. Eitt nú hava USA, Kina, Russland, India og Pakistan ikki skrivað undir.

-USA hevur ikki skrivað undir, tí amerikanararnir stúra fyri, at hetta er bara byrjanin. Landminur hava ongan hernaðarligan týdning fyri USA, men stjórnin er bangin fyri at fáa krøv um forboð ímóti øðrum vápnum, skrivar hon undir.

Jody Williams hevur góðar vónir um, at Kina, India og Pakistan fara at skriva undir forboðið. Kinverjar hava í øllum førum tikið eitt týðandi stig, tí teir eru givnir við at útflyta landminur.

# Dømdur fyri morð 41 ár seinni

**Fyrrverandi Ku Klux Klan-leiðarin Edgar Ray Killen kann fáa 60 ára fongsul fyri trý morð í 1964.**

Dómur
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Eftir at hava hugsað seg um í tveir dagar samdust nevningarnir í býnum Philadelphia í amerikanska statinum Mississippi um, at tann 86 ára gamli Edgard Ray Killen var høvuðsmaðurin aftan fyri trý morð har í 1964.

Tað var tann 12. juni í 1964, at nakrir menn úr Ku Klux Klan burturfluttu teir tríggjar borgararættindastríðsmenninar James Chaney, Andrew Goodman og Michael Svhwerner. Hálvan annan mánað seinni vórðu lík teirra funnin. Tað sást, at teir høvdu fingið harðliga viðferð, áðrenn teir vórðu myrdir. Nevningarnir í Philadelphia komu til ta niðurstøðu, at tað var Edgar Ray Killen, sum gav boð um morðini.

Sambært AP kann Edgar Ray Killen fáa 60 ára fongsul - 20 ár fyri hvørt morðið.

Tilburðurin fyri 41 árum síðani gjørdist kendur um allan heimin við filminum "Mississippi Burning", ið hevði Gene Hackman í høvuðsleiklutinum.